Lagt til rættis: Heini í Skorini · heini_skorini@yahoo.com



# Føroyar stink

## "At flyta heim skal ongantíð verða ein skylda"

Christian Nagata **er stjóri á KT-fyritøkuni NEMA, sum eftir fleiri samanleggingar er Føroya størsti veitari av KT-, skrivstovu- og samskiftistænastum. Hann er cand. merc. aud. og læs og arbeiddi í Keypmannahavn frá 1989 til 1997 og í Los Angeles frá 1998 og 2004, tá hann flutti heim. Áðrenn NEMA sá dagsins ljós, var hann fíggjarstjóri á Føroya Shell.**

**Hvat hevur verið tað besta við at flyta heim?**

*Eg ætlaði mær ongantíð heimaftur til Føroya, men familjan flutti heim í 2002, og tvey ár seinni fór eg aftaná væl vitandi, at eg ongantíð fór at tjena tað sama í Føroyum. Tá eg kom heim seint í 2004, hevði samfelagið flutt seg nógv frameftir, og hetta kom í roynd og veru óvart á meg. Vinnulívið var vorðið meiri professionelt og tolsemið meiri útbreitt. Mínar royndir frammanundan vóru annars, at tað snúði seg meiri um at kenna fólk enn at hava tær røttu dygdirnar fyri at sleppa framat á arbeiðsmarknaðinum. So tað var absolutt positivt at koma heim og kunna staðfesta, at hetta samfelagið hóast alt mennist á fleiri hermótum.*

*Mínar royndir eru, at um tú ert opin, um tú hevur hugflogið og um tú hevur hugin, so eru nógvir møguleikar í Føroyum. Her trýtur ikki við spennandi uppgávum og inspirerandi avbjóðingum. Tað er fyrimunurin við einum lítlum samfelagi. Á eini stórari fyritøku í USA situr man við sínum avmarkaða øki, men í Føroyum er relativt lættari at folda seg út og snodda til alt millum himmal og jørð.*

**Hvat hevur verið tað ringasta við at flyta heim?**

*Hóast áðurnevndu fyrimunir við at búgva í einum lítlum landi, so er støddin eisini tann størsta forðingin. Eitt land við 48.000 íbúgvum fer altíð at hava sínar natúrligu avmarkingar, og tað fara altíð at vera ein rúgva av tingum, sum heilt einfalt eru ógjørlig at gera í Føroyum. T.d. fer eingin nakrantíð at granska í rúmdarskipum í Føroyum, tí tað hava vit ikki ráð til. Føroyar er eisini tilafturskomið, tá tað snýr seg um at veita immateriallar tænastur, tí vit hava í alt ov langa tíð ikki framleitt annað enn fisk.*

**Hvat skulu vit gera fyri at fáa útisetar heimaftur?**

*Tað skal ongantíð vera ein skylda at flyta heimaftur. Og eg haldi, at øll eiga at fáa sær starvsroyndir uttanlands, áðrenn tey venda nøsina heimeftir. Misskil meg ikki. Eg vóni, at so nógvir útisetar sum gjørligt koma aftur til Føroya, tí vit hava harðliga brúk fyri útbúnum fólki. Men tey skulu einans koma heim, um tey tíma at flyta heim, tí vit hava ikki brúk fyri fólki, sum ikki hava eitt positivt útgangsstøði. Og so vil eg fegin leggja afturat, at vit hava ikki bara brúk fyri føroyskum útisetum, men so sanniliga eisini fyri kompetentum útlendingum. Núverandi mótstøðan ímóti útlendskari arbeiðsmegi í Føroyum er til stóran skaða fyri vinnulívið og fyri landið.*



## "Eitt hav av møguleikum og ein køvandi kjakmentan"

Sonja Jógvansdóttir **er stjórnmálafrøðingur og samskipari í fakfelagssamtakinum Samtak, sum er eitt samstarv millum Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag og Føroya Fiskimannafelag. Hon hevur búð og lisið í Edinburgh, Keypmannahavn og Brússel. Seinast hon vendi nøsini heimeftir var í desember 2006.**

**Hvat hevur verið tað besta við at flyta heim?**

*Tað hevur altíð verið natúrligt fyri meg at flyta aftur til Føroya. Man hevur onkursvegna eitt djúpt kensluligt og helst eisini irrationelt tilknýti til Føroya, so fyri meg var tað ongantíð eitt veruligt val, hóast eg havi trivist væl uttanlands.*

*Føroyski arbeiðsmarknaðurin hevur eitt hav av møguleikum. Um tú hevur nakrar kvalifikatiónir, so er rættiliga opið at royna tað, sum tú hevur hug til. Eg eri eitt livandi dømi um, at tú hevur relativt lætta atgongd til tað, sum hevur tín áhuga. Eg bjóðaði meg fram sum ráðgevi hjá fakfeløgunum, og tað endaði við fakfelagssamtakinum Samtak, sum hevur verið eitt ófatiliga spennandi arbeiði. Atgongdin til spennandi størv valdast sjálvandi, hvussu góð pappír ein hevur, men lesandi útisetar hava altso nógv at koma heimaftur til. Tað snýr seg um hugflog og um at síggja tørvirnar í einum samfelagi.*

**Hvat hevur verið tað ringasta við at flyta heim?**

*Sum útiseti gloymir man, hvussu ótespiligir teir føroysku vetrarnir eru, men tað fáa vit ikki gjørt so øgiliga nógv við. Umframt veðrið er ein tann størsti trupulleikin, at vit duga illa at vera ósamd uttan eisini at blíva óklár. Tá samfelagið er so lítið og persónligu relatiónirnar so tættar, er lættast at umganga konfliktirnar. Vit hava onkursvegna ein loyalitet yvirfyri hvørjum øðrum, sum køvir okkara kjakmentan. Fólk halda seg aftur og lata vera við at siga og gera ymiskt av ótta fyri persónligum konfliktum, og tað er ein veldig forðing fyri at menna hetta samfelagið. Fólk skuldu torað betri at sagt og gjørt tað, sum tey meina er rætt og neyðugt. Tað er nevniliga munur á kritikki og negativiteti.*

**Hvat skulu vit gera fyri at fáa útisetar heimaftur?**

*Eg sakni ikki ein miðvísan útisetapolitikk, men ein miðvísan útbúgvingarpolitikk. Um vit høvdu fleiri útbúgvingarmøguleikar í Føroyum, so høvdu so nógv ung ikki noyðst av landinum. Tað er fínasta slag at flyta av landinum, men tað eigur í størri mun at vera eitt val. Um vit t.d. høvdu útbúgvingar innanfyri sosialráðgeving, ergoterapi, fysioterapi o.s.fr., so høvdu fleiri verið verandi.*

*Manglandi bústaðar- og familjupolitikkurin er ein orsøk til, at fleiri útisetar ikki koma heimaftur. Í so máta eftirlýsa útisetar tað sama sum íbúgvarnir í Føroyum. Vit fara ongantíð at fáa meiri enn eini 60 prosent heimaftur, tí eftir fimm ár í øðrum londum eru fólk so mikið etablerað, og tí skulu vit eisini fokusera uppá aðrar bólkar enn akademikarar. T.d. tey, sum av eini ella aðrari orsøk rýma av neyð. Tey eru fleiri og fleiri í tali, og tey eru sum oftast mist fyri altíð.*

